Fylgiskjal 5

**Sørin Pram Sørensen**

---

| | |
|---|---|
| **Fra:** | Ken Nónklett |
| **Sendt:** | 12. februar 2019 15:54 |
| **Til:** | VMR-Journal |
| **Cc:** | Jógvan Thomsen |
| **Emne:** | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg og í vinnufyritøkulógini til hoyringar (Skráseting av veruligum eigarum) |

Til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið,

Innleiðandi kann viðmerkjast, at Skráseting Føroya er við í grundardátuverkætlanini hjá Talgildu Føroyum. Ein liður í hesi verkætlan er at gera eina almenna virkisskrá yvir allar eindir í Føroyum (kann samanlíknast við CVR-registeret í Danmark). Í hesum sambandi verður eisini arbeitt við at gera eina eigaraskrá, har bæði løgligir (legalir) og veruligir eigarar skulu skrásetast.

Annars hevur Skráseting Føroya hesar viðmerkingar til uppskotið:

1. Uppskotið áleggur Skráseting Føroya fleiri uppgávur uttan at peningur fylgir við. Raksturin hjá Skráseting Føroya er inntøkufíggjaður og tískil gerst tað avbjóðandi hjá Skrásetingini at røkja sínar uppgávur til fulnar. Ein partur av uppgávuni hjá Skráseting Føroya verður at hava eftirlit við (gera stakroyndir), at upplýsingar um veruligar eigarar eru rættar. Hetta kann gerast rættuliga arbeiðskrevjandi.

2. Uppskotið áleggur feløgum og grunnum v.m. at savna upplýsingar um veruligar eigarar og fráboða Skráseting Føroya skjótast gjørligt. Hetta er viðkomandi fyri tey feløg og grunnar, sum longu eru stovnað. Ynskiligt er, at tað verður eisini sett inn sum krav, at feløg og grunnar skulu upplýsa veruligar eigarar í sambandi við stovnan. Um hesar upplýsingar ikki fyriliggja við stovnan, eigur skráseting av felagi ella grunni at verða noktað. Hendan broyting er gjørd í donsku lóggávuni bæði í mun til skrásetan av løgligum og veruligum eigarum.

3. Í uppskotinum framgongur, at manglandi fráboðan ella skrásetan av veruligum eigarum kann revast við bót. Ynskiligt er, at Skráseting Føroya fær heimild til at senda feløg og grunnar til tvingsilsavtøku, um hesi ikki hava skrásett nakrar upplýsingar um veruligar eigarar. Hendan broyting er gjørd í donsku lóggávuni. Orsøkin til broytingina er, at donsku myndugleikarnir mettu heimildina at áleggja bøtur vera ov arbeiðskrevjandi og ikki nóg munagóða.

4. Nakað av skrivifeilum eru í uppskotinum.

Vinarliga / Best regards

**Ken Nónklett**

Deildarleiðari

Skráseting Føroya

Sigmundargøta 13
Postrúm 264
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel. + 298 35 60 10 / beinl. 35 60 16